GJALDSTOVAN

Fylgjandi spurningar eru komnir frá einum veitara

Spurningur

*Vit hava hesar spurningar um  Rammusáttmáli – Posar*

***Vanligur beriposi:*** *Eru ávís krøv til stødd ella mál? Kunnu tit upplýsa hesi. Tjúgdin/styrkin upplýsa tit er á 75 my, hetta er sera nógv til ein vanligan beriposa – vanliga er tjúgdin/styrkin á umleið 45 my, er 75 my serstakt krav ella kann uml. 45 my góðtakast?*

***Frystiposar:*** *Er loyvt at bjóða frystiposar við i undir 40 my? Frystiposar hava vanliga eitt tjúgd/styrki á umleið 35 my.*

Vit hava dagført útbjóðingartilfar samsvarandi

**Svar – beriposar**
Vit ynskja ein vanligan sterkan "allround" posa, sum eisini klárar tyngri vørur. Og vit duga at síggja, eftir at hava kannað tað umaftur, at 75my er kanska í meira lagi, og vit kunnu góðtaka niður til 50my.

**Svar – frystiposar**
Vit síggja at stovnar fyri tað mesta keypa 40my posar, og vit hava eftirkannað tað hjá einum stórum stovni, sum svarar at tað hevur týdning at posar eru sterkir posar, sum ikki skrædna ov lætt, av beinum og líknandi hørðum matvørum.

Hinvegin síggja vit at 34-35 my er vanligt fyri frystiposar hjá nógvum veitarum.

Um ein 35my posi livir upp til okkara tørv, fáa vit ikki svara frammanundan. Tað má dómsnevndin meta um, eitt nú við at kannað tað nærri.

Hallur Thomsen
Deildarleiðari

2. Juli 2025

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO